tólindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Høgni Mohr, Niclas Johannesen

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Tjóðveldisflokkurin nú høvi at vísa lit...

Oddagrein

Morgindagurin kann gerast ein stórur dagur fyri tann tímlønta føroyingin - tí í morgin verður tað, at vit fáa eina ábending um, hvørt okkara kosnu menn og kvinnur unna tímalønta føroyinginum somu treytir undir sjúku, sum tey unna teim fastløntu.

Tað hevur verið eitt langt stríð hjá løntakarafeløgum - og teimum politikarum, ið hava stríðst fyri rættindum løntakaranna - at vinna tey rættindi, sum vit hóast alt hava í føroyska samfelagnum. Tí var tað sjálvandi svárt, at nakrir borgarar mátta lata vunnin rættindi í kreppuárunum (her hugsa vit um lógina um karensdagar, sum uttan iva verður avtikin á tingi fyrsta dagin). Men hetta gjørdu løntakararnir við solidariskum huga - stóðu saman øksl móti øksl í stríðnum at fáa landið úr búskaparkreppuni. Hetta eiga politikararnir í dag at hava í huga.

Vit hava á hesum stað fyrr víst á tann ójavna, ið landsstýrið nú fremur við ikki *eisini* at lata tímaløntu føroyingum somu rættindi undir sjúku, sum fastløntum. Tað er ikki at skilja, at landsstýrið ikki fyri einaferð skuld kann javnseta hesar báðar bólkar, tá høvi býðst - við at broyta lógina um dagpengar, so tey tímaløntu eisini fáa dagpengar frá fyrsta sjúkradegi.

Fólkaflokkurin hevur longu gjørt greitt, at flokkurin ikki tekur undir við at taka av lógina um karensdagar. Hetta var sjálvandi hugsandi, tí tað eru ikki júst sosialu viðurskifti løntakaranna, ið liggja flokkinum fremst í huga. Kortini var tað landsstýrismaður Fólkafloksins, ið legði uppskotið fram.

Tá nú Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Miðflokkurin standa saman um at leggja uppskotið um broytingar í dagpengalógini fram, er mikið hugsandi, at uppskotið verður samtykt. Hesir flokkar hava 14 tingmen. Tað merkir, at teimum tørva tríggjar samgonguatkvøður fyri at fáa uppskotið samtykt.

Nú er talan um eitt andstøðuuppskot - og av royndum vita vit, at samgongupolitikarar treyðugt taka undir við teimum. Umberingin plagar at eita, at *landsstýrið arbeiðir við málinum.* Men Tjóðveldisflokkurin hevur nú fleiri eldhugað ungfólk í tingbólkinum, sum hava roynt at víst seg sum stuðul løntakaranna.

Eitt upplagt høvi hjá Tjóðveldisflokkinum at melda út løntakarapolitikkin...

Sosialurin

Viðmerking:

Almenningurin og Hvítabók

– Til tess at savna spurningar fyri og ímóti ríkisrættarliga rákinum, er Sosialurin er farin undir at savna spurningar, sum verða svaraðir, tá allir partir eru til reiðar - um eina góða viku

Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum

Í blaðnum í gjár varð lýst við nýggjum tiltaki í blaðnum: „Spyr um Hvítu". Endamálið við hesum tilfari er at lýsa bæði innihald í Hvítubók og eisini vantandi innihald. Nettupp nú tá so stórar og kollveltandi broytingar standa fyri framman í føroyska samfelagnum hevur tað ómetaliga stóran týdning, at eitt so stórt og álvarsligt mál sum framtíðin hjá okkum øllum og okkara eftirkomarum verður so væl lýst sum til ber, sakliga og breitt, frá øllum síðum.

Føroyska pressan hevur eina stóra ábyrgd í hesum:

– at lýsa viðurskiftini væl og virðiliga - frá øllum síðum og sjónarvinklum. Her verður bæði hugsað um at endurgeva og lýsa, hvat Hvítabók sigur okkum, men so sanniliga eisini, hvat hon ikki sigur okkum — hvørjar spurningar hon ikki setur og tí eisini hvørji svar vanta.

Eitt politiskt orðaskifti um Hvítubók er nakað ambuterað, tá andsstøðan á løgtingi hevur valt at bíða við at úttala seg. Argumentini eru skiljandi. Nú landsstýrið hevur havt góða tíð at kunna seg við innihaldið í Hvítubók og hevur havt ein hóp av serfrøðingum at gera eitt arbeiði út frá einum ávísum arbeiðssetningi er skiljandi, at andstøðan eisini vil fáa møguleika at kunna seg og seta sínar serfrøðingar at kanna tilfarið.

Hóast tað út frá einum fjølmiðlasjónarmiði kann tykjast øvugt at skula bíða eftir einum orðaskifti og at fáa svar frá andstøðuni um Hvítubók, so halda vit, at man eigur at respektera hetta ynskið hjá politisku andstøðuni.

Landsstýrisfólkini hava fleiri ferðir víst á, hvussu týdningarmikil informeringin er kring alt fullveldis- og sjálvstýrismálið. Ja, hvussu stóra ábyrgd miðlarnir hava. Hetta meta vit eisini vera rætt, men umframt upplýsingina um innihaldið í Hvítubók, so hevur tað alstóran týdning at fáa settar krittiskar spurningar til innihald og manglandi innihald.

Hetta var eitt av endamálunum við umrødda teigi okkara „Spyr um Hvítubók". Vit vilja við hesum tiltaki gera okkara til, at orðaskiftið verður fjølbroytt men eisini krittiskt. Ætlan okkara er at lata spurningar til bæði landsstýrisfólk, umboð fyri politisku andstøðuna og fakfólk annars.

Um so er, at onkur hevur fingið ta fatan við at lesa um tiltakið í Sosialinum í gjár, at tiltakið serliga er ætlað Høgna Hoydal og løgmanni, so er hetta antin miskilt, ella hava vit ikki megnað at lýst nóg væl, hvat hetta snýr seg um.

Ætlan okkara hevur verið at savna saman tilfar, fáa spurningar, fara til røttu viðkomandi at fáa svar og síðani viðgera og seta hetta upp í blaðnum.

Fyrsta tilfarið verður so at koma í blaðið um eina góða viku ella so.

At vit hava valt at kalla teigin „Spyr um Hvítu" er so eitt. Men sjálvandi er ætlanin ikki at avmarka seg bara til tað, sum stendur og verður viðgjørt í hesi bók. Ætlan okkara er at fáa eitt orðaskifti, at seta spurningar og fáa svar, sum taka støði í núverandi og framtíðar viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar.

Tí er „Spyr um Hvítu" líka nógv ein spurningur til Edmund Joensen, Jenis av Rana og Jóannes Eidesgaard sum til Høgna Hoydal ella Anfinn Kallsberg. Ætlan okkara er at lýsa alt málið frá øllum sjónarhornum - bæði við teimum positivu og teimum negativu avleiðingum, sum broytingar so ella so mugu hava við sær.

Vónandi fáa vit nógvar góðar og krittiskar spurningar og uppfylgjandi skilagóð svar.

Við vón um eitt lívligt og sakligt orðaskifti
Jan Müller, blaðstjóri

Frá »Grímu« og Leikarafelag Føroya

Vælvitjaðu Café kvøldini á Gamla Meiarínum halda fram

Hvørt hóskvøld í september bjóðar Gríma á Café, og í annaðkvøld er aftur okkurt áhugavert á skránni.

Hesuferð eru tað aftur nøkur av okkara evnaríku, ungu listarfólkum og tónleikarum sum seta sín dám á kvøldið:

Ein Jazzkvartett við songkvinnuni Eivør Pálsdóttir á odda. Eivør hava vit fyrr hoyrt í bólkinum Klikkheys. Afturat sær hevur hon dugnaligar tónleikarar: Michael Blak, á kontrabass, Halgir Arge, trummur og Búi Egasson Dam, guitar.

Eisini luttekur bólkurin »e♭moll« (verður úttalað ess moll!!), sprottin úr bólkinum »Lokum«, sum vit serliga minnast fyri sangin Charlie. Í »e♭moll« spæla Michael Blak, Hallur Johannesen og Rókur Jakobsen - nakrar av hesum tónleikarum kenna fólk óivað enn betur sum manning í bólkinum »Tangz«.

Í foyerinum er listaframsýning, við myndum hjá Jens L. Thomsen og John David Joensen, báðir ungir listarmenn úr Eysturoynni.

Tað serliga við hesum kvøldinum er, at Atlantic Radio fer at senda beinleiðis frá Caféini - og Jóhan í Kollafirði støkkur inn á gólvið, og hvat hann fer at finna uppá, er ikki gott at vita!!

Kvøldið byrjar kl. 20.00 og kostnaðurin er 80,- kr. íroknað kaffi og køkur. Kvøldini eru ætlaði sum stuðulskvøld. Gríma savnar pening saman, til at keypa innbúgv, o.a. til leikhúsið á Meiarínum, so hava fólk hug at lata meira enn tað sum atgongumerki kostar, eru tey vælkomin til tað.

Eisini ber til at tekna seg sum »Grímu stuðul« og gjalda pening inn á konto í Fø. Sparikassi nr. 451 4590.

Atgongumerki fáast á Kunningarstovuni ella við dyrnar.

Stuðlað tiltakinum hava: Føroya Keypssamtøka, P/f Frants Restorff, Hjalmar Jacobsens Bókhandil, P/f Poul Michelsen, Sosialurin, Føroya Bjór, Konditattíið, MáF, Margarínfabrikkin, Læraraskúlin og Sjónleikarhúsið umframt allir luttakarar og hjálparfólk.

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi tá kæra kona mín og mamma okkara

MARIANNA HANSEN
Vestmanna

doyði og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur og kransar og peningagávu til kirkjuna.

Tummas Enok og børnini